# 8 spurningar um jól

**Jákup Veyhe**



***Hvat er tað besta við jólum?***

Tað besta við jólum... tað eru ljósini sum eru allastaðni. Einglar, stjørnur, ketur, neon, alt møguligt. Tað er allastaðni og tað fær okkum at gloyma myrkrið sum allatíðina er - serliga um okkara leiðir. Tað er óført.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***

Tað keðiligasta... tað er keðiligt at stressa - men tað er ein spurningur sum tú kemur til seinni, so eg má finna okkurt annað - jú, at leikuhandlar og telefyritøkur venda sær so nógv til børnini dámar mær ikki væl. Og okkurt árið hevur tað verið ringt at skula vera í góðum lag tá ið man ikki er í lag til tað. Har burdi man havt eini alternativ jól ella ójól. Kanska kundi Høgni Djurhuus skipa fyri tí. Tað hevði verið stuttligt. Óalminduliga stuttligt.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***

Ofta helt eg jól á Sandi hjá ommusystir mínari. Óivað sum júl flest í Føroyum: Í kirkju seinnapart, og tá ið vit koyrdu heim við bussinum vóru livandi ljós í nærum øllum húsum. Tað var hugnaligt. Ómetaliga hugnaligt.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***

Satt at siga veit eg ikki enn hvar vit fara. Møguliga vera vit í Hesti hjá systir mínari. Har er gott. Ótrúliga gott.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***

Hvat skal eg halda. Handlarnir umseta fyri 40% av ársumsetninginum í desember so tað má vera res. Men tað hendir nógv og eg fái ikki stundir at koma runt. Tað er óheppið.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***

Ja, í Keypmannahavn og í Odense. Nærum einsamallur, men eg havi hugsað mær kortini. Óført.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***

Mínar jólagávur? Nei, tær fái eg. Men eg keypi jólagávur til onnur. Og tær keypi eg allar sjálvur. Ókey?

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***

Eg ynski mær.... bíða... Altíð handa spurningin, men eg veit ongantíð... tað er óheppið. Nei, nú veit eg: Ó!


























